# Bilaframsýningar vi

**Í vikuskiftinum vóru tvær stórar bilaframsýningar í Runavík og í Klaksvík, har bilasølurnar sýndu fram nýggjastu bilarnar á føroyska marknaðinum**

**FRAMSÝNING**
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Hetta er tíðin, tá bilaframsýningar eru kring landið. Í vikuskiftinum vóru tvær bilaframsýningar, ein í ítróttarhøllini í Runavík, sum svimjifelagið "Flot" skipaði fyri, og ein í KÍ-høllini í Klaksvík, sum felagið "Teiti" skipaði fyri.

Í KÍ-høllini vóru hesar bilasølurnar umboðaðar: Ivan Johansen Bilar, Berg Motors, Reyni Service og Norðbil/ Nordcar. Í Runavík vóru hesar bilasølurnar: Reyni Service, Auto Service, VR Bilar, Wenzel, Berg Motors og Norðbil/Nordcar.

Við tað at nógvar av bilasølunum selja fleiri bilmerkir, vóru yvir 20 ymisk bilmerkir umboðað á báðum bilaframsýningunum.

Framsýningarnar vóru væl vitjaðar, og stórur áhugi var fyri nógvum av teimum nýggju bilmodellunum, sum eru komin á marknaðin í vár.

Vit hava her myndir frá báðum framsýningunum.

**mg**

















